Teir ósjónligu dukkuførararnir

Føroyskir teldusníkar.
– At hava tamarhald á maskinum á einum gassverki, sum eg kanska kundi sløkkja, er ta› villasta eg havi uppliva›.
Ta› sn‡r seg um avbjó›ingar, spenning - og makt. Sosialurin hevur tosa› vi› tríggjar føroyskar teldusníkar.

Eisini í Føroyum eru fólk, sum hava sum ítriv at bróta inn í teldur hjá privatfólki og fyritøkum. Bla›i› hjá Føroya Tele, Trá›urin, skriva›i í heyst, at politii› hevur eingi mál, sum snúgva seg um hacking. Men sambært lei›aranum á kriminaldeildini, Bergleif Brimvík, er hetta ikki einsljó›andi vi›, at eingin hacking er í Føroyum. Hann heldur at fyritøkur møguliga eru bangnar fyri at melda hacking av ótta fyri at ta› kann ska›a teirra umdømi

OR›: DÁNJAL HØJGAARD

MYND: JENS KR. VANG

Teir vita at ta› er ólógligt, og at teir kunnu enda handan rimarnar í fleiri ár, ver›a teir tiknir.

Kortini kunnu teir ikki lata vera.

Teir síggja ikki seg sjálvar sum vandamiklar lógbrótarar - heldur sum teir tríggjar muskiterarnar - sum royna at finna hol og veikleikar í telduskipanunum.

Sosialurin hevur fingi› samband vi› tríggjar ungar menn, sum n‡ta ein stóran part av síni frítí›, at bróta inn í telduskipanir. Alt bendir á, at teir mynda bró›urpartin av einum lítlum skara av føroyingum, sum mi›víst fáast vi› vandamikla ítrívi›, sum kallast hacking.

Ongin av teimum vil vera nevndur á navni. Tískil hava vit givi› teimum dulnevnini Anton, Bergur og Carl.

Anton er 20 ára gamal, Bergur 17 og Carl 18. Teir siga seg hava dyrka› hacking ímillum hálva anna› og tr‡ ár.

Breyt inn í gassverk

Teir f‡ra føroysku teldusníkarnir grei›a frá, at teir fyrst og fremst bróta inn í privatar telduskipanir - bæ›i í Føroyum og uttanlands. Fyritøkurnar eru ofta betri vardar og tískil verri at bróta inn í.

Tó so.

Anton hevur eftir øllum at døma hóreiggja sær á einum telduservara hjá Føroya Tele. Bergur grei›ir frá, at hann hevur broti› inn í telduskipanina hjá internetcaféini Orbits í Havn og gamla Atlantic Radio.

Og Carl grei›ir gle›iliga frá teirri fer›ini, tá hann skal hava broti› inn í telduskipanina hjá einum eitt gassverki í Danmark.

-Eg slapp inn á st‡risskipanina hjá teimum. Eg veit ikki um eg kundi gjørt nakran ska›a. Eg nart í hvussu so ikki vi› naka, tí eg vildi ikki geva teimum møguleika, at spora meg. Telduskipanin var› gjørd solei›is at starvsfólk kundu og st‡ra henni uttanfyri verki› - tí kundi eg hacka meg inn í hana, sigur hann.

67 dollarar á bók

Anton grei›ir frá, at hann einafer› breyt inn í telduna hjá einum manni í Avstralia. Har útvega›i hann sær atgongd til persónligar og loyniligar uppl‡singar.

-Eg sá eg at hann hev›i havt heimagrei›slu-forriti› frá. Eg sendi honum eini bo› um, at heimagrei›sluforriti› hev›i sta›fest, at forriti› ikki hev›i veri› í brúk í eina tí›, og ba› hann vinarliga skriva brúkaranavn, loynior› og navni á bankanum í ein serligan teig - og ta› gjørdi hann.

-Sí›ani fór eg inn á heimagrei›slu-forriti› og fann út av at avstraliuma›urin hev›i 67 dollarar standandi á bók. Eg kundi kanska flutt pengarnar - men ta› hev›i veri› truplari, sigur Anton.

Sletta›i barnaporno

Carl sigur, at einafer› eydna›ist honum at bróta inn í telduna hjá einum privatum internetbrúkara í India.

-Hann hev›i barnapornu inni á telduni og hev›i eitt slag av fíl-servara, ha›ani onnur pedofil kundu leggja inn og taka myndir. Eg slettа›i har›diskin, og ta› haldi eg hann hev›i gott av.

Yvirtaka telduna

Føroysku teldusníkarnir siga, at ta› javnan kemur fyri, at teir eru inni í privatum teldum í Føroyum og sneyta.

-Ta› er nokkso óskyldugt. Tú fert inn í dokumentini at hyggja, t.d. um teir duga væl at skriva stíl. Tú kanst eisini sleppa inn í postkassan at sneyta.

-Fer ein teldubrúkari frá eini teldu, sum tú hevur yvirtiki›, kanst tú skriva eitt teldubræv uppá nakkan á honum. Men ta› mest vanliga er at tú kannar eftir um teir eiga onkran áhugaverdan tónleik, sum er verdur at taka, siga teldusníkarnir.

Trølli› í eskjuni

Anton, Bergur og Carl grei›a frá, at vanligasti hátturin hjá teimum, at bróta inni í telduskipanir er vi› at n‡ta sonevndar Trojanir.

Trojanir er m.a. felagsheiti fyri ymisk telduforrit, sum hackarar n‡ta at tryggja sær atgongd til teldurnar hjá ø›rum.

Ein Trojan virkar sum ein fjarst‡ring. Offri› móttekur eitt teldubræv, ein fíl, ein diskil ella eina fløgu. Og á hesum er eitt slag av virusi, i› setir í telduna, og sum ger, at hackarin fær yvirtiki› st‡ringina av telduna.

Hackara-forrit hava veri› seld í føroyskum handlum. Men Anton, Bergur og Carl siga, at teir vanliga útvega sær tey ólógligu hackaraforritini á serligum chatkanalum fyri teldusníkar.

Á chat-kanalum kunnu teir eisini útvega sær skipanir, sum kunnu finna út av hvørjir brúkarar, i› hava móttiki› trølli› í eskjuni.

-Fyri at fáa atgongd til eina skipan er kanska ney›ugt at n‡ta fleiri forrit í senn.

-Ta› ræ›ur um at smitta onkran vi› virusinum, at fáa onkran at taka ímóti tí Trojanska hestinum. So ta› sn‡r seg m.a. um at sannføra fólk um at hetta er ikki vandamiki›.

-Men ta› finnast eisini forrit, sum gera, at hevur tú fyrst móttiki› forriti›, so veitst tú ikki av nær tú ver›ur smitta›ur næstu fer›.

-So tey bestu rá›ini móti hackarum eru, at tú ikki tekur ímóti nøkrum sum helst.

Ósjónligi dukkuførarin

Teir tríggir føroysku teldusníkarnir eru grei›ir yvir, at teir fáast vi› eitt ítriv, sum er brandólógligt. Og at hacking er at gera seg inn á privatlívi› hjá fólki.

Kortini leggja teir doy›in á, at endamáli› vi› at vera teldusníkur ikki er at fremja herverk.

-Ta› er avbjó›ingin, i› telur. Vit eru “teldu-freaks” og royna at gera naka›, sum vanlig fólk ikki klára, sigur Bergur.

-Ta› er spenningurin, i› dregur. Tú kennir teg sum tann “ósjónligi harrin” yvir teldunum - “Tann ósjónligi dukkuførarin”. Slagor›i› hjá hackarum er: “Hygg bara, men nert ikki vi›”, sigur Anton, sum - eins og hinir - kortini heldur at stuldur er loyvdur.

-Mær dámar kensluna av at kunna st‡ra eini a›rari teldu, - ja, makt! At hava st‡ringina á nøkrum maskinum á einum gassverki, sum eg kanska kundi sløkkja, er ta› villasta eg havi uppliva›.

-Og so er ta› fyri at læra. Tú lærir ótrúliga nógv um hvussu teldur og net virka. Tú fært eina vitan, i› kann tryggja tær eitt arbei›i seinni.

Ein vinartænasta

Ta› ljó›ar kanska løgi›.

Men teir tríggir føroysku teldusníkarnir halda at teir í roynd og veru gera fólki eina stóra tænastu vi› at bróta inni í teirra telduskipanir.

-Vanliga geri eg altí› fólk varug vi›, at eg havi veri› inni í teirra telduskipan. Eg royni at hjálpa teimum. Eg haldi at eg man hava rudda› Trojanir úr teldunum hjá eini hundra› internetbrúkarum.

-Fólk ver›a vanliga gla› fyri hjálpina. Tí vit vísa teimum á holini, so at tey kunnu verja seg næstu fer›, sigur Bergur.

Moralurin telur

Innbrot í telduskipanir er eitt álvarsamt brotsverk. Eitt brotsverk, sum í ringasta føri kann geva fongsulsrevsing í fleiri ár.

Men at teir bróta lógina taka teir tríggir teldusníkarnir ikki so tungt.

-Hatta taka vit eitt líti› sindur lætt upp á. So leingi tú heldur, at tú ikki ska›ar nakran, ella oy›ileggur naka›, so leggi eg einki í um ta› er ólógligt. Ta› er moralurin sum telur.

Kortini vísir ta› seg, at moralurin kann vera eitt vítt hugtak hjá einum hackara.

-Vóru ta› pengarnir hjá einum persóni, tú fekst atgongd til, so hev›i eg havt ringa samvitsku av at flutt mær teir. Men var ta› ein banki, sum átti pengarnar - ja, so var ta› bara ein banki, sigur Bergur.

Men teir tríggir leggja dent á, at ta› t‡ndningarmesta vi› at vera hackari er avriki›.

At kunna vísa, at tú hevur veri› har, sum eingin annan hevur veri›.